stubbar uttaneftir

Framgongd fyri finsku kommunistarnar

Fólkademokratarnir, finsku kommunistarnir, triðstørsta kommunistaflokkurin í Vesturueuropa, stóð greitt sum sigurharri aftan á uppteljingina sunnu- og mánadagin, og hevði eina framgongd upp á umleið 2%.

Tá helmingurin av atkvøðunum vóru upptaldar, høvdu Fólkademokratarnir fingið 19,1%, ein framgongd við 2,1%.

Størsti flokkurin í Finlandi, Sosialdemokratarnir fingu eina afturgongd upp á 0,9%.

Stóri borgarligi flokkurin, Miðflokkurin, var tann ikki sosialistiski flokkurin, sum fór mest fram.

Konservativi savningarflokkurin fekk eina framgongd upp á 0,8%, sum tilsamans gevur flokkinum 18,4 prosent av atkvøðunum.

Móti at rakettir verða latnar

Amerikanski verjumálaráðharrin, James Schlesinger, hevur sagt, at hann fer at vera ímóti at geva Ísrael tær nógv framkomnu Perhing miðteina rakettir.

EF rósar Danmark

Danska innspræningin upp á 5 miljardir krónur til at fáa lív aftur í figgjarliga virki, fekk rósandi umtalu frá figgjarmálaráðharrafundi í EF og rósandi umtalu frá bæði figgjarligu sambindingarnevndini hjá EF og EF-kommisjónini, segði figgjarmálaráðharri Per Hækkerup aftan á fundin.

Rúmdarfundir í Portugal

Meira enn 400 rúmdargranskarar úr umleið 40 londum — millum teirra Sovjettsamveldinum og USA — fara mánadagin at luttaka í upplatingini av 26. altjóða rúmdaraðalfundinum í Lissabon. Fundurin er hin fyrsti av altjóða slag, sum verður hildin í Portugal síðani kollveltingina í apríl í 1974. Nakrir fáir kendir rúmdargranskarar koma ikki við. Amerikansku rúmdarfararnir hava av rúmdarstøðini NASA fingið boð um, at teir ikki sleppa at luttaka, tí rúmdarfarar mugu ikki ferðast til øki, sum NASA av trygdarorsøkum metir at vera »politiskt óstøðug«.

Nýtt kríggj í Miðeystri

Palestinski leiðarin Yasser Arafat hevur í eini samrøðu við ungarska sjónvarpið sagt, at støðan í Miðeystri er heilt nær upp undir eitt fimta kríggj.

Nýggjur peningur í Suðurvietnam

Nýggja stjórnin í Suðurvietnam hevur sagt, at ein nýggj peningaskipan skal koma í staðin fyri hin devaluerða pjastrin frá tíðini undir



stýri Nguyen Van Thieu forseta. Í frágreiðingini vóru øll handisfólk biðin um at lata aftur handlar sínar, og fólkið varð biðið um at halda seg av gøtunum í sjey tímar, fyri at skriva í skema um pengagoymslur sínar og skriva umsóknir um at fáa gomlu pengarnar býttar um við teir nýggju.

Sveits við í valutaslanguni

Fíggjarmálaráðharrarnir í Felagsmárknaðinum og í Sveits eru komnir ásamt um at lata sveitsarafrankin koma upp í »valutaslanguna« hjá EF, upplýsir figgjarmálaráðharrin í Belgia Willy de Clerq.

panelið

Dollarin og vit

Í samband við tær rættuliga stóru broytingar, sum hava verið í ráfiskaprísunum seinastu árini, hevur frágreiðingin í rættuligan stóran mun verið tann, at dollarvirði er broytt. Og verunleikin er eisini tann, at virðið av dollaranum er av avgerandi týdningi fyri okkara búskap. Meginparturin av okkara flakaframleisðslu verður jú seld til USA, men annars verða fleiri aðrir fiskaprísir og eisini valutakursir óbeinleiðis ávirkaðir av støðuna hjá dollaranum.

Inn til 1971 var dollarkursurin fastur í mun til krónuna, og gav 1 dollar tá 7,50. Hetta árið varð dollarin tó niðurskrivaður, og tvey ár seinni, í 1973, varð dollarin gjørdur flótandi, soleiðis at virðið av honum verður avgjørt av útboði og eftirspurningi. Sum hjásetta mynd vísir, hevur dollarin síðan tá sveiggjað almikið, og hevur hetta havt beinleiðis ávirkan á okkara ráfiskaprísir. Grundarlagið fyri útrokningunum av ráfiskaprísunum á hýsu og toski 44—70 cm. er galdandi prísur í USA. Í dag er prísurin á hýsu í 5 punds pakkum 87 cent pr. Lb., t. v. s. 454 gr. Um dollarkursurin er 6,00, verður prísurin hesin:

0,87 dollar á 5,50 : 0,454 kg. = 11,50 pr. kg.

Um kursurin í staðin hevði verið 5,50, hevði úrslitið verið hetta:

0,87 dollar á 5,50 : 0,454 kg. = 10,54 pr. kg.

Hetta gevur ein mun upp á 96 oyru pr. kg. flak. Roknað verður við, at tað fara 3,3 kg. av ráfiski til 1 kg. av flaki, og tá svarar hesin munur til 29 oyru pr. kg. ráfisk. T. v. s. at tá dollarin hækkar 10 stig, ávirkar hetta hýsuprísin A við 6 oyrum.

Tað prísfall, sum vit høvdu frá november 1974 og til umleið juni mánaða, var fyri ein stóran part orsakað av falli í dollarkursinum. Í november 1974 var dollarin umleið kr. 6,00, men so við og við fall hann til umleið 5,40. Hetta mátti jú merkjast á fiskaprísunum, og tað gjørdi tað eisini. Fyri 2 mánaðum síðani byrjaði hann tó at menna seg aftur, og tá hesar reglur verða skrivaðar, er hann um 6,20.

Í dag:



Óli Jacobsen fiskimannafelagsformaður

Úrslitið av hesi hækkan hevur eisini verið ein tilsvarandi hækkan av av avrokningarprísinum, og so mikið kann sigast fyri vist, at uttan hesa hækkan, høvdu tær 10 milliónirnar í ráfiskagrunninum ikki strekt langt.

Orsøkin til hesa menning av dollaranum er, at figgjarliga rákið í USA er vent, soleiðis at yvirskotið á handilsjavnvágini er økjandi, prísvøksturin er minkaður, og ídnaðarframleiðslan er í menning. Hetta saman við øðrum hevur styrkt um álitið til amerikanska búskapin, og úrslitið er so ein sterkari dollar.

Hvat ávirkar dollarkursin?

Orsøkin ti, at dollarin hevur ment seg aftur, er, sum sagt, tann, at vend er komin í figgjarligu gongdina í USA, og at framstig í búskapinum verða merkt næstan dagliga. Men kursurin hækkar ikki javnt dag um dag. Til tíðir ger hann stór lop uppeftir, meðan hann so inn ímillum stendur í stað og kanska eisini lækkar.

Tey viðurskifti, sum ávirka gongdina í dollaranum, eru rættuliga nógv. T. d. hevur rentulegan ein stóran týdning, Rentulegan er hægri í USA enn í Europa, og styrkir hetta um dollaran. Øll góð tíðindi hava eisini eina mennandi ávirkan. Um mánaðartølini fyri amerikansku handilsjavnvágini eru góð, merkist hetta beinanvegin á dollarkursinum. Verður roknað við góðum tølum upp undir eina slíka mánaðarliga kunngering, so mennir hetta eisini, men eru tølini ikki so góð, sum roknað varð við, fellur dollarvirðið beinanvegin aftur. Uttanríkisviðurskifti, sum amerikanska sølan av korni til Sovjet og friðaravtalan í Miðeystri, hava eisini havt eina mennandi ávirkan.

Men so eru eisini onnur viðurskifti, sum trýsta dollaran.

Danmark fær eina ferð um mánaðin sini gjøld úr grunnunum hjá EF. Uppundir hesa útgjaldan styrknar krónan altíð við tí úrslitið, at dollarin fær tilsvarandi lægri virði. Eitt annað trýstandi fyribrigdi er »profit taking«. Hetta kemur fyri, tá teir, sum hava keypt dollars við vinningi fyri eygað, selja hesar fyri at realisera vinningin. Um hetta verður gjørt av nógvum í senn, kann dollarin vikna nakrar dagar.

Tað kunnu eisini vera heilt óvanlig viðurskifti, sum gera seg galdandi. Fyrst í hesum mánaðinum var orsøkin til dollarfall, at býurin New York var við at fara á húsagang, og tað var ivasamt, um býarkassin kundi greiða fyrstkomandi lønargjaldsdag.

Fyrst í hesi vikuni hækkaði dollarin frá 613,80 mánadag til 621,65 týsdagin. Í hesum førinum var frágreiðingin tann, at tey **týsku** handilsjavnvágtølini vóru sera vánalig, og økta dollarstyrkin í mun til D-markin var orsøkin til hetta lop.

